## VIÐMERKINGAR

# Landsstýrið lítisvirðir Løgtingið

**Bill Justinussen,**
*løgtingsmaður*



Í seinastu viku var kunnandi fundur í Almanna- og Heilsumálaráðnum um uppskot til ílegugransking. Landsstýrissamgongan saman við fjølmiðlum varð boðin við, meðan andstøðan á Løgtingi varð sett uttanfyri. At landsstýrismaðurin kunnar fjølmiðlarnar um so umfatandi lógaruppskot, áðrenn løgtingslimir verða kunnaðir, er eftir mínum tykki at biðja um trupulleikar heldur enn at biðja um breiðar semjur. Fjølmiðlarnir verða ikki teir, sum skulu atkvøða um hetta uppskot í Løgtinginum, men tað skulu løgtingslimir. Hví landsstýrismaðurin valdi at kunna fjøl-miðlarnar heldur enn Løgtingið og politisku flokkarnar, má hann sjálvur svara fyri, men framferðin er undir alt lágmark. Men kanska eru føroysku fjølmiðlarnir eftirhondini vorðnir ein so integreraður partur av propagandamaskinuni hjá Landsstýrinum, at teir bara vóru mettir sum ein annar partur av samgonguni. Fleiri óhugnaligar ábendingar hava verið undir hesi samgonguni um, at Føroya Løgting ikki longur er hægsta politiska forum í Føroyum, men heldur samgongufundirnir. Hendan samgongan hevur í ólukkumát megnað at flutt politiska orðaskiftið úr tingsalinum og handan læstar hurðar úti í Tinganesi, og tá semja endiliga er um okkurt mál, verða allar hurðar latnar upp fyri fjølmiðlunum, so øll kunnu síggja, hvussu væl alt sær út. Vit fólkavaldu løgtingslimir eru tíverri ofta teir síðstu at hoyra um hvíta roykin frá samgongufundunum.

### Viðspælari

Síðani eg gjørdist løgtingslimur fyri góðum ári síðani, havi eg lagt meg eftir at viðgera øll uppskot á Løgtingi positivt og við opnum sinni. Soleiðis havi eg tikið undir við og atkvøtt fyri nærum øllum uppskotum, sum samgongan hevur lagt fram, og serliga uppskotini, sum landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum hevur lagt fyri Tingið. Í flestu málum eru vit báðir sera samdir, og soleiðis er eisini í spurninginum um ílegugransking. Tí harmist eg um, at tað ikki untist mær og hinum úr andstøðuni at vera við til framløguna, tí so mikið verri eru vit fyri at luttaka í orðaskiftinum og so mikið betri er samgongan fyri at luttaka. Og fjølmiðlarnir eru langt síðani liðnir at viðgera uppskotið, tá andstøðan endiliga sleppur burtur framat við sínum boðskapi, men tað er kanska júst ætlanin við hesum óvanliga framferðarhátti. Vit mugu hava í huga, at tá eitt uppskot verður snikkað til, tekur hetta í onkrum førum fleiri ár at fáa tað væl úr hondum greitt. Í hesum føri - eins og í øðrum førum - er landsstýrismaðurin ikki einsamallur gubbi at uppskotinum, fleiri undan honum hava barslast við málið til tað nú endaliga er búgvið at leggja fyri Tingið. Tað er ikki landsstýrismaðurin sjálvur, sum ger tað lógartekniska arbeiðið. Ei heldur ger hann alt annað umsitingarligt arbeiði, sum er tengt at uppskotinum. Tað hevur hann eina umsiting til. Hendan umsitingin er ikki bara amboð í hondum landsstýrismansins, men kann sigast at vera "ogn Føroya fólks". Tí hevur andstøðan á Løgtingi sín heilt náttúrliga rætt sum ein týðandi partur av politiska myndugleikanum at njóta ágóðan av og fáa innlit í tað arbeiði, sum umsitingin greiður úr hondum.

### Søgan um uppskotið

Uppskotið um ílegugransking er úrslitið av arbeiði hjá fleiri landsstýrismonnum. Tað byrjaði longu í 1999, tá táverandi landsstýrismaður á fyrsta sinni bar eitt líknandi uppskot í Tingið. Síðani kom stígur í, tí undirtøka var ikki fyri tí tá. Tá landsstýrissamgonga varð skipað í 2002, fekk Miðflokkurin heilsumál at umsita, og vóru vit tá samd um at arbeiða víðari við uppskotinum. Ein politisk semja varð gjørd, sum m.a. tók einkarrættarstøðuna burtur úr uppskotinum ásannandi, at granskingin skuldi bjóðast frítt og javnbjóðis út, og at tað almenna skuldi umsita vevnaðargrunnin, sjúklingaskránna og ættarskránna og vera millumliðið millum landið og granskaran. Hetta uppskotið varð liðugt snikkað til í januar í fjør, altso fyri valið í 2004. Síðani hevur núsitandi landsstýrismaður arbeitt víðari við tí uppskotinum og gjørt nakrar broytingar afturat, havi eg skilt fjølmiðlarnar rætt. Enn havi eg ikki sæð uppskotið og kann tí ikki gera ítøkiligar viðmerkingar, men tó fari eg at viðgera tað við vælvild og í stórum spenningi.

### Nýggj vinna

Ongin ivi er um, at vinnuligir møguleikar innan hetta økið liggja fyri framman. Heilivágsídnaðurin umsetir fyri hundraðtals milliardir árliga. Kunnu vit føroyingar gerast bert ein flís í hesum ovurmikla buli, vil hetta hava búskaparligan týdning fyri okkum. Drívmegin undir øllum hesum er at finna fram til nýggjar sjúkuorsøkir og at finna viðgerðarhættir og heilivág, sum kann lekja. Tá eg sum landsstýrismaður tók hetta málið framaftur fyri góðum tveimum árum síðani, hildu onkrir javnaðarmenn, at tíðin helst var farin frá ílegugranskingini. Men nú ið teir sjálvir umsita hetta málið, er tíðin knappliga ikki farin frá tí allíkavæl, og tað fegnist eg sjálvsagt um. Bitland Føroyar gevur nú eisini hesum uppskoti góð viðmælir. Tað kunnu teir helst gera, tí teir kenna uppskotið. So væl fyri eru vit andstøðuløgtingslimir tíverri ikki. Vónandi fer samgongan at broyta framferðarhátt og venda aftur til vanligan fólkaskikk, har alt Løgtingið verður kunnað, tá serfrøðingarnir innan umsitingina hava okkurt gott upp á hjarta.

# Orka & orkupolitikkur

**Hjalmar N. Poulsen**
*Vestmanna*

Løgtingsorðaskiftið sum herfyri snúði seg um orkumál, var bæði áhugavert og upplýsandi - tó mest áhugavert. Hóast mangar góðar meiningar vóru frammi, bar orðaskifti brá av einum ávísum ókennskapi til orku. Hetta førdi eftir mínum tykki til eitt ávíst møsn um málið, men sum heild vóru sjónarmiðini saklig og fyrikomandi.

Gleðiligt er, at Løgtingið ídag er samt um, at orða ein yvirskipaðan orkupolitikk, hóast vit enn ikki kenna avleiðingarnar av hesum.

Mest undrunarvert var tó, at ongin røðari undir orðaskiftinum nam við spurningin um tað nú søguliga orkuráðið, sum í sínari tíð varð avtikið vegna sparingar í landshúsarhaldinum, og tær avleiðingar vit ídag hava av hesu tilgongd. Landsins leiðsla tá á sinni gjørdi sær eina stóra bjarnatænastu. Sum kunnugt hevur allur tann føroyski orkupolitikkurin, sum so, verið monopoliseraður og sera einssporaður.

Føroysku hægtølini, vit ídag hava kunnleika til hvat dálking av umhvørvi viðvíkjur, bera tíðilig tekin um, at skeiva gongdin hevur tikið dik á seg hesi síðstu 15 árini. Og koltvíiltútlátini eru støðugt hækkandi. At soleiðis er, hava fyrst og fremst landsins polittusku mynduleikar ábyrgdina av. Hetta, tí teir á sinni valdu at avtaka skynsamu orkupolitisku stýringina á hesum, so týðandi, málsøki til frama fyri nakrar spardar krónur á tí føroysku landsfíggjarlógini.

"Orka og orkupolitikkur" er í sjálvum sær eitt sera vítt fyribrigdi. Orðatakið: "Ongin er fullkomin" er eisini galdandi á hesum øki, men eitt ávíst skynsemi, ein ávísur førleiki, og sunnur fornuftur, eru lyklaorðini, sum skulu havast í huga, tá orkupolitikkir verður settur út í kortið. Veruleikin er, at bert fantasiurin setur forðingar fyri, at ein skilagóður orkupolitikkur, framyvir verður førdur.

Hóast føroyska samfelagið í orkuhøpi er at samanbera við ein dropa í havinum, eiga vit at spyrja okkum sjálvi, um onki ítøkiligt kann gerast, fyri at venda hesi negativu umhvørvisskaðiligu gongdini. Svarið er stutt og greitt. - Jú sanniliga!

Í føroyska orkukervinum eru óteljandi møguleikar fyri at nøkta ein og hvønn orkutørv. Allar fortreytir eru til staðar, fyri at hetta kann lata seg gera á ein reinan og umhvørvisvinarligan hátt, uttan at tað nýtist at vera sera kostnaðarmikið yvirhøvur. Nútíðartøknin á orkuøkinum bjóðar okkum so at siga óskerdar møguleikar, sum vit burdu brúkt, okkum og ikki minst samfelag okkara til hollan frama. Eg skal annars seinni, tá høvi býðst, koma nærri inn uppá hetta, tí talan er ikki um pástandir, men reinan veruleika.

Havi tó ongantíð verið í iva um, at orkuframleiðslan á tí føroyska orkukervinum, um ynskiligt, kann blíva omanfyri 90% grøn, ella ódálkandi, áðrenn langt um líður. Vit eiga sjálvsagt at seta okkum hetta stevnumið. Um eitt ávíst áramál verður avsett til at náa hetta endamál, er treytin tann, at rætt verður atborið, frá byrjan av, áðrenn nakað ítøkiligt verður gjørt á økinum. Hugsið bert um idealistin á sinni, sum fór til gongu, og uppá forhond visti hvar hann var á veg, og stílaði eftir at koma til ásetta staðið til ásettu tíð. Sjálvsagt náddi hann endamáli sínum, - hann var jú idealistur. Heldur ivasamt er at siga sum "Egon", sum á sinni helt fyri: "Jeg har en plan"!!

# Løgmaður drálað ov leingi í málinum um uttanríkispolitisku heimildirnar, men vónandi kunnu føroyingar nú standa samdir

**Høgni Hoydal**
*Fólkatingsmaður*



Løgmaður hevur loksins vent sær til danska forsætisráðharran viðvíkjandi teirri sonevndu uttanríkispolitisku heimildarlógini, sum ætlanin er at seta í gildi fyri Grønland og Føroyar.

Undirritaði reisti málið bæði á fólkatingi og á løgtingi í fjør, har eg vísti á, at talan var um beinleiðis afturstig fyri Føroyar í mun til støðuna í dag, og at lóggávan fór at binda Føroyar fastar í okkara alneyðuga samskifti við umheimin.

Og tann 14. januar í ár - áðrenn fólkatingsvalið varð skrivað út - heitti eg skrivliga á løgmann um at biðja danska forsætisráðharran steðga viðgerðini av grønlendsku heimildarlógini, tí hon hevur ásetingar í sær, sum eisini binda Føroyar, og hon kann seta landsstýrið í eina sera vánaliga samráðingarstøðu, verður hon samtykt. (Sí hjálagda avrit av brævi til løgmann).

Tá vildi løgmaður bíða eftir einum møguligum fólkatingsvali.

Nú er lógin um uttanríkispolitiskar heimildir fyri Grønland aftur á dagsskránni í Fólkatinginum. Undirritaði fer sjálvsagt framvegis at mótmæla, at grønlendska lógin verður viðgjørd í verandi líki, har hon eisini hevur ásetingar um Føroyar.

Og undirritaði fer at vísa á, at lógin á ongan hátt kann góðtakast í Føroyum.

Hóast tað er harmiligt, at løgmaður hevur drálað í málinum, so fegnist eg um, at samgongan nú tekur undir við teimum atfinningum, sum vórðu førdar fram longu í fjør, og at løgmaður hevur vent sær til danska forsætisráðharran um málið.

Vónandi fer tað at eydnast í felag at fáa málið á beint, um allir flokkar á Løgtingi eru samdir.